Helena Dam á Neystabø:

# Tikið seg úr samgonguni

Helena Dam á Neystabø sendi mánadagin 28. januar Anfinni Kallsberg, løgmanni bræv, har hon sigur, at hon ikki longur er partur av tí parlamentariska grundarlagnum undir samgonguni.

– Tá eg síðst í november mánaði í fjør boðaði løgtinginum frá, at eg varð uttanflokka tingkvinna, gjørdi eg eisini greitt, at eg stuðlaði samgonguni og hennara politikki, sigur Helena Dam á Neystabø í brævinum til løgmann.

Eisini sigur hon, at hon royndi alt síðsta heyst at fáa samgonguna at taka undir við einari hækking av pensjónunum við umleið 30 milliónum krónum, tí hon helt, at hetta var rímiligt og fíggjarliga ráðiligt, men ynski hennara fekk tíverri onga undirtøku í samgonguni, og tað harmast Helena um.



*Helena Dam á Neystabø sendi mánadagin løgmanni bræv, har hon sigur, at hon ikki longur er partur av tí parlamentariska grundarlagnum undir samgonguni*

– Nú beint eftir, at fíggjarlógin er samtykt í løgtinginum, kemur landstýrið í bráðskundi við uppskoti um at hækka pensjónirnar. Sjálvandi er tað betur seint enn ongantíð, og eg fari eisini at taka undir við einum slíkum uppskoti. Men uppskotið er so illa frágingið, at tað fær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar, sum júst hava gjørt sínar fíggjarætlanir fyri 2002, leggur Helena Dam á Neystabø afturat í brævinum.

Eisini sigur hon, at hetta málið við pensjónunum og mong onnur mál, sum verða tikin fram nú av landsstýrinum og teimum einstøku samgonguflokkunum, sýna, at álvarsemið í arbeiðinum hjá landsstýrinum og samgonguni er burtur, og at tað snýr seg um hjá flokkum og einstaklingum at stilla seg í besta ljósið nú løgtingsval stendur fyri durum. Soleiðis, heldur Helena Dam á Neystabø, ber ikki til at reka seriøsan politikk.

Og grundað á hesar orsøkir boðaði Helena løgmanni og samgonguni frá, at hon ikki longur er partur av tí parlamentariska grundarlagnum undir samgonguni.

# Nýggjur møguleiki til tónleikarar

TÓNLEIKUR

Gulli Johansen, sum hevur verið við til tvær Prix Føroyar kappingar, boðar frá, at nú er ein nýggjur møguleiki fyri føroyskar tónleikabólkar ella einstaklingar á internetinum.

Ein heimasíða er sett upp, sum skal virka sum ein sýnisgluggi til útheimin. Á hesi heimasíðu hava allir føroyskir bólkar møguleika at vísa, hvat teir fáast við. Tónleikur, tíðindi, upplýsingar, kontakt og myndir eru uppskot til tilfar, ið bólkarnir kunnu leggja út á netið. Hvør bólkur fær sína egnu kontu, sum teir sjálvir ráða yvir.

Endamálið við síðuni er, at vísa føroyskan tónleik fram um heimin, skapa kontaktir við ymisk feløg uttanlands og at virka fyri, at føroyskir bólkar sleppa uttanlands at spæla.

Heimasíðan liggur undir www.ghj-musicmarketing.com

**-ib**



*Gulli Johansen hevur gjørt eina heimasíðu har føroyskir tónleikabólkar fáa møguleika at sýna fram tað teir hava hug til*

Fólkaflokkurin:

# Punktgjøldini skulu avtakast

**Punktgjøldini, sum hava verið uppi og vent nakrar ferðir í seinastuni, skulu avtakast, sigur Fólkaflokkurin**

PUNKTGJALD

*Ingrid Bjarnastein*

Í tíðindaskrivi Fólkaflokkurin hevur sent út, sigur flokkurin, at hann tekur undir við at avtaka øll punktgjøld á el-lutum.

– Hetta verður gjørt í tráð við samgonguskjalið, har avtalað er at linka skatta- og avgjaldstrýstið á húsarhald og framleiðslu, so at kappingarføri vinnulívsins batnar og megnar at bera landsins felags húsarhaldi", sigur Fólkaflokkurin.

Flokkurin leggur dent á, at tað er skeivt, tá Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri sigur í fjølmiðlunum, at Fólkaflokkruin er ímóti avtøku á punktgjøldum á el-lutum.

– Fólkaflokkurin vil varðveita MVG-frítøkuna á lønum til bygging og umvæling av egnum bústaði, og harvið er tað satt, tá Karsten Hansen sigur, at Fólkaflokkurin er ímóti at áleggja fleiri gjøld á millum annað sethúsabygging, sigur Fólkaflokkurin í tíðindaskrivinum.

Vónað verður av flokkinum, at Karsten Hansen kemur fram við einum uppskoti um at avtaka punktgjøldini á el-lutum.



*Karsten Hansen hevur sagt við fjølmiðlarnar, at Fólkaflokkurin er ímóti avtøku av punktgjøldum. Hetta er tó ikki rætt, sigur Fólkaflokkurin í tíðindaskrivi*

## Pallborðsfundurin hjá Foreldrafelagnum

Foreldrafelagið skipaði í gjár fyri pallborðsfundi, við heitinum Barnaansing – rættur ella krav? Í hesum sambandi hevði foreldrafelagið fingið umboð úr teimum politisku flokkunum við, og luttakararnir vóru hesir: Laila á Lofti fyri Fólkaflokkin, Ronald Poulsen, Sjálvstýrisflokkurin, Jónfinn Olsen, Miðflokkurin, Heðin Mortensen, Sambandsflokkurin, Kristian Magnussen, Javnaðarflokkurin og Høgni Hoydal fyri Tjóðveldisflokkin.

Meira verður um pallborðsfundin í blaðnum í morgin.

**– ib**

# Radiogrundaða neyð- og trygdartænastan á havinum yvirtikin

YVIRTØKA

*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjadagin 1. februar verður radiogrundaða neyð- og trygdartænastan á havinum, tað sum eisini er kent, sum Tórshavn Radio, yvirtikið til føroyskt málsræði.

Tænastan húsast á Telegrafstøðini undir heitinum Tòrshavn Radio, og er hon, eins og í Danmark, ein samansjóðaður partur av Stranda Radiotænastuni. Tað vil siga neyð- og trygdartænastur og avgreiðsla av samrøðum og fjarritum til og frá skipum og bátum. Starvsfólkini á Telegrafstøðini hava tann neyðuga førleikan, sum tænastan krevur sambært altjóða ásetingum til at røkja uppgávurnar.

Henda tænasta er av alstórum týdningi fyri trygdina hjá manningini á bátum og skipum á føroyskum havøki.

Føroya Tele fer framhaldandi at útinna tænastuna, tó við tí grundleggjandi broyting, at Føroya Tele er álagt rakstrarábyrgdina av tænastuni mótvegis landsstýrinum og at føroyskir myndugleikar hava ábyrgdina av tænastuni. Føroya Tele fær eisini endurgoldið útreiðslunar í sambandi við tænastuna, og er á fíggjarlógini fyri 2002 lagt upp fyri hesum.

Í sambandi við, at Fiskimálastýrið skipar føroyska havbjargingarstøð (MRCC) og Tórshavn Radio verður yvirtikið, verður arbeiðsbólkur settur at kanna, hvussu sambandið skal vera millum hesar uppgávur framyvir.

Umboð frá Tele Danmark er komin til Føroya í sambandi við yvirtøkuna fyri at staðfesta handanina av ábyrgdini av uppgávuni til Føroya Tele.



# Skopuningar keypt hús til bjargingarstøð

**– Kommunan hevur keypt ein bygning frá J & K Petersen. Húsið skal brúkast til bjargingarstøð**

TILBÚGVING

*Áki Bertholdsen*

Umstøðurnar at seta bjargingartiltøk í verk í Skopun skulu nú gerast betri.

Skopunar Kommuna hevur keypt ein vinnubygning frá J & K Petersen fyri 420.000 krónur, sum skal brúkast til tilbúgvingina í kommununi-og kanska í Sandoynni sum heild.

Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun, heldur, at Kommunan hevur gjørt eitt gott keyp.

Húsið hevur eina gólvvídd uppá einar 200 fermetrar, umframt eitt loft sum er partvíst innrættað.

– Húsið liggur í ídnaðarøkinum, beint norðanfyri bygdina, tætt við tyrlupallin, so tað liggur væl fyri.

Tað er eisini hampiliga nýtt, bygt síðst í áttatiárunum og tað eru tvær stórar hurðar í húsinum, so at onki er í vegin fyri at koyra inn og út við stórum bilum ella amboðum.

Borgarstjórin sigur, at ætlanin er nú, at alt, sum hevur við bjarging og tilbúgving í Skopun at gera, skal flyta inn í húsið, umframt at tað eisini ber til at fáa øll amboð hjá kommununi undir tak.

Húsið er so mikið stórt, at tað er pláss fyri øllum, bæði sløkkibili, sjúkrabili og allari útgerð, sum ein slík tilbúgvingarstøð krevst.

Hann sigur, at í løtuni er eitt sløkkilið í hvørjari bygd og hann heldur, at tað kundi verið eitt hugskot at savna alla tilbúgving í Sandoynni yvirhøvur, bæði sløkkilið og sløkkiliðsútgerð, og aðra útgerð, undir sama taki.

Hann leggur afturat, at at hetta er ein spurningur, sum er borin upp á mál við aðrar kommunur í oynni, men fyribils er meiri ivasamt við undirtøkuni.

– Í øllum førum ber til at siga, at vit hava so skapt karmarnar fyri, at øll tilbúgving í Sandoynni kann samskipast á einum staði.

– Men verður tað av ongum, er hetta í -llum førum eitt hús, sum Skopunar Kommuna væl fær brúkt sjálv til ymisk endamál, tí í løtuni eru amboð og útgerð hjá kommununi ymsastaðni.

Tey eru farin so smátt at flyta í húsið, men tað skal eisini málast og hampast.



*Skopuningar fáa nú bjargingarmiðstøð og borgarstjórin heldur, at tað kundi verið eitt gott hugskot at savna alla tilbúgving í Sandoynni undir sama takið og tað er tað pláss fyri í húsinum í Skopun*

**Kommunuskrivstovan byggjast út**

Annars er Skopunar Kommuna farin at fyrireika seg til at kunna umsita tey málsøki, sum tosað verður um at flyta frá landinum, til kommunurnar.

Í tí sambandinum hevur bygdaráðið í Skopun eisini samtykt at byggja kommunuskrivstovuna út.

Umframt at gera hana ístand uttan, er ætlanin at gera loftið, har skal ein stórur salur vera og ein skrivstova og wc.

Tað arbeiðið skal nú bjóðast út.

Annars letur bygdaráðsformaðurin í Skopun væl at gongdini. Kommunan hevur lagt eina fíggjarætlan fyri 2002 sum javnvigar við 13 milliónum krónum og tað er áleið tað, sum skattainntøkan hjá kommununi verður mett at vera í ár. Hetta er yvir 1,5 millión meiri enn í fjør.

Harafturat hevur kommunan lækka skattaprosentið, úr 23% í fjør, niður í 22,5% í ár.

Gerhard Logneberg sigur, at verða umstøður til tess, verður tað heilt vist sett longur niður næsta ár.

Barnafrádrátturin í ár er óbroyttur, 2.500 krónur.

Í Sandoynni verður ikki tosað um at leggja kommunur saman. Bygdaráðsformaðurin í Skopun er ikki talsmaður fyri samanlegging. Hann vil heldur hava samstarv við hinar kommunurnar og hann sigur, at kommunurnar í oynni samstarva um nógv ymisk mál, og tað samstarvið gongur sera væl.

– Tað liggur ein tileggjan í at tað eru fleiri kommunur í oynni. Verða tær lagdar saman, hevði tað kanska dovna eitt sindur, men fyri tað vber væl til at samstarva, sigur Gerhard Lognberg.

## Fara nú undir nýggja kommunuskrivstovu

**Sumbiar Kommuna fer nú undir at gera kommunuskrivstovu í gamla Fiskahúsinum á Mølini**

KOMMUNUUMSITING

*Áki Bertholdsen*

Umsitingin hjá Sumbiar Kommunu fær nú betri umstøður. Tað er nakað síðani, at kommunan keypti gamal fiskahúsið, sum hevði staðið tómt eina tíð og ætlanin hevur síðani verið at innrætta tað til kommunuskrivstovu.

Húsið varð keypt fyri góðar 300.000 krónur og nú hevur Landsbyggifelagið gjørt uppskot um, hvussu tað skal innrættast. Bygdaráðið hevur nú samtykt uppskotið og hevur biðið Landsbyggifelagið gera útbjóðingartilfar og bjóða arbeiðið út.

Eftir uppskotinum verður helvtin av húsinum goymslurúm, sum ikki verður innrættað.

Men hin helvtin verður innrættað við fundarhøli, tveimum skrivstovum, skjalagoymslu og wc.

Upprunaliga hevði hevði Landsbyggifelagið skotið upp at gera ein útbygning við nógvum glasi oman ímóti sjónum. Har var ætlanin, at undirhús skuldi vera, har sumbingar kunnu hittast í fríløtum, eins og vit kenna tað frá øðrum undirhúsum kring ymsastaðni í landinum.

Tann ætlanin er nú slept. Men ístaðin verður eitt alment wc í húsinum.

Í fíggjarætlanini fyri 2002, eru 500.000 krónur settar av til at innrætta húsið fyri og at hampa tað uttan.

Borgarstjórin í Sumba, Jacob Vestergaard, segði herfyri við Sosialin, at tað kann tykjast nakað stórt til kommununa. Men samstundis vísir hann á, at landsstýrið tosar í heilum um at legga fleiri og fleiri málsøki út til kommunurnar at umsita. Og tá ið kommunan fer undir eitt hús, er tað betri at leggja upp fyri, so at tað eisini nøktar tørvin framyvir.

Hann sigur, at verða fleiri øki løgd út til kommunurnar at umsita, er hann sannførdur um, at eisini Sumbiar Kommuna er før fyri at umsita tey øki, sum kommunurnar eftir ætlan, skulu umsita, men so er eisini neyðugt at neyðug høli til umsitingina.



*Øll kommunal umsiting í Sumba skal nú flæytast í nýggj høli í gamla Fiskahúsinum á Mølini, men undirhúsið, sum skuldi vera í útbygninginum omaneftir, er slept*

# Byggja havnalagið í Lopra út

**Farið verður nú at flyta grót úr Lopransdali, oman í Ónavík, har tað skal brúkast at fylla út við**

ÚTBYGGING

*Áki Bertholdsen*

Nú verður farið undir arbeiðið at byggja havnalagið í Lopra út.

Sumbiar Kommuna, sum Lopra er í, hevur fingið tilsøgn frá Landsverkfrøðinginum um at fáa 20.000 kubikk av gróti, sum varð skotið úr Sumbiarbergholinum, og sum nú liggur í Lopransdali og tað skal nú flytast oman á havnalagið.

Arbeiðið at flyta grótið úr Dalinum, oman í Ónavík, har tað skal brúkast at fylla út við, varð boðið út herfyri og tað var stórur áhugi fyri at fáa tað.

Jacob Vestergaard, borgarstjóri, sigur, at 15 tilboð komu inn uppá at gera arbeiðið. Lægsta tilboðið hevði Michael Pauli Johansen á Tvøroyri, hann bjóðaði sær til at flyta grótið fyri 330.000 krónur og tí tilboðum samdust bygdaráðið um at taka av.

Tað var rættiliga stórur munur á tilboðunum, tí tað dýrasta tilboðið var uppá 739.000 krónur, men tey flestu lógu um 450.000 krónur.

Tað skilst, at arbeiðið at flyta grótið skal byrja nakað skjótt.

Endamálið við arbeiðnum er at Kommunan skal hava ídnaðarøkið til taks, skuldi áhugi verið fyri vinnuligum virksemi av onkrum slagi í Lopra. Sumba er brimpláss burturav so har gerst onki framvið sjónum, men umstøður at hava góða havn í Lopra eru góðar.

Annars liggur mangt slíkt av grótið, sum varð sprongt úr bergholinum í Lopransdali. Mett verður, at eini 100.000 kubikk liggja í Dalinum og Sumbiar Kommuna hevur gjørt krav uppá at fáa alt til havnaútbygging í Lopra.

Men landsverkfrøðingurin hevur lovað vágbingum tað til Havnaútbygging. Hetta viðurkenna sumbingar ikki, tí teir siga, at teir frammanundan høvdu fingið munnliga tilsøgn frá Landsverkfrøðingium til alt grótið. Teir siga eisini, at tað er siðvenja, at kommunan, haðani grótið kemur, eisini hevur fyrsta rætt at fáa tað. Sakførari hevur kannað málið í eina tíð, men enn er onki nýtt frá honum, sigur borgarstjórin.